# JÓLINI UNDIR KRÍGNUM

– ALT VAR **MYRKALAGT**, SO TAÐ VAR IKKI **HUGSINGUR** UM AT HAVA LJÓS UTTANDURA. **OG** JÓLINI BYRJAÐU **JÓLAAFTAN**, TEY VARDU IKKI FLEIRI **MÁNAÐIR**, SUM TEY GERA NÚ. UNDIR **KRÍGNUM** VAR SJÁLVANDI LÍTIÐ TIL AV **ØLLUM**, MEN TEY ROYNDU SUM **FRÆGAST** AT GERA TAÐ HUGNALIGT OG **GOTT** FYRI BØRNINI. MEN **JÓLAMANNIN**, HANN KENDU VIT IKKI, SIGA **POUL SØRENSEN** OG **HANNEFÍA NÆSS**, SUM BÆÐI ERU FØDD Í **1923**. **VIT** HAVA SETT **TEIMUM** STEVNU Á ELLISHEIMINUM **TJARNARGARÐI**, HAR TEY **BÚGVA**, FYRI AT TOSA UM **JÓLINI** UNDIR KRÍGNUM.



**JÓL UNDIR KRÍGNUM**
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

– Nú er so stór yvirflóð av øllum, og jólini vara í fleiri mánaðir. Tá gleddi man seg til jólaaftan, tí tástani komu jólini. Og tað var nakað heilt serligt, minnist Poul Sørensen. Hann er føddur í Havn og hevur búð her alt sítt lív. Nú býr hann á ellisheiminum Tjarnargarði, har marinustøðin áður helt til.

– Nei, leggur Hannefía afturat, – Eg minnst heldur einki til, at desembermánaður var nakað serligt. Alt var sum vant, og jólini komu ikki fyrr enn jólaaftan. Hannefía Næss er av Kirkju, men kom til Havnar sum ung at vera arbeiðskona, og hon fór aldri út aftur til Fugloyar.

### Jólatræ

Poul greiðir frá, at tey í Havn vóru von at hava jólatræ, men tá kríggið kom, og sambandið við umheimin steðgaði upp, bar ikki til at fáa hendur á jólatrøum.

– Man vandi seg skjótt við, at nú var tað kríggj, og so var tað bara soleiðis. Vit hugsaðu ikki so nógv um, at tað var øðrvísi, enn tað plagdi.

– Men tey seinnu árini av krígnum fekk Valdemar Lützen nøkur stór jólatrø heim, tey vóru hægri enn manshædd, og tey endaðu á skúlum og hjá ymsum felagsskapum. Børnini dansaðu jólatræ í skúlanum, men tá tey fóru í jólafrí, so stóð tað bara har til onga nyttu. Pápi mín var yvirlærari, og tí fingu vit jólatræið heim til okkara jólaaftan.

– Eftir, at vit høvdu brúkt tað jólaaftan, gekk tað uppá skift til ymsar samkomur og KFUK. Men tað mundi vera nakað miserabelt at enda. Tá var tað væl brúkt og var flutt fleiri ferðir, minnst Poul flennandi.

Á Kirkju var ikki vanligt at fólk høvdu jólatræ heima. Hannefía sigur, at tað altíð bleiv dansað í skúlanum, men undir krígnum var einki jólatræ í bygdini.

– Tá jólatrø seinni fingust aftur, tóku fleiri seg saman og keyptu eitt jólatræ í felag, so børnini skuldu sleppa at dansa.

Tá var heldur ikki pyntað til jóla, sum nú. Hannefía sigur, at húsini blivu væl og virðiliga skúrað til jóla, men tey høvdu einki jólapynt.

– Jólatræið hjá okkum bleiv harafturímóti væl pyntað, minnist Poul. Hann greiðir frá, at børnini ikki sluppu at pynta træið, tí tað gjørdu mamman og pápin, og tað var gjørt í allari hemmiligheit. Ikki fyrr enn jólaaftanskvøld sluppu børnini at síggja pyntaða træið.



*Poul Sørensen og Hannefía Næss práta um gamlar dagar á Tjarnagarði, har tey bæði nú búgva. Tey vóru bæði 16 ár, tá seinna kríggið brast á, og tey minnast tí væl jólini undir krígnum.*

– Eitt árið hevði ein av beiggjunum hjá mær sníkt seg at lúrt eftir trænum. Tá varð hann var lagdur uppá lærið, tí tað gjørdi man ikki, minnist Poul við einum brosi.

### Myrkalagt

Desember mánaður var tá ikki baðaður í ljósi og perum, sum hann er nú. Alt skuldi vera myrkalagt, og tað var ikki lukkuligt, um onkur ljósrípa kom undan gardinunum.

– Einaferð minnst eg, at politiið bankaði uppá hjá okkum kl 2 ella 3 um náttina. Tá vóru gardinurnar ikki nóg væl drignar fyri uppi á loftinum, so ljósið sást. Eg minnist, at pápi kom upp á loftið og bað okkum fáa gardinurnar ordiliga fyri. Tað var ikki at skemta við, minnist Poul.

Tað var einki serliga hugaligt at vera úti, eftir at tað var vorðið myrkt, tí tað gjørdist so bølamyrkt orsakað av myrkaleggingini.

– Skuldu vit út, eftir at myrkrið varð komið á, so kundu vit hava eina lummalykt við okkum, men hon skuldi lýsa beint niður á vegin. Vit máttu ikki lýsa framfyri okkum, har vit gingu, greiðir Hannefía frá.

– Ja, sigur Poul, – og lyktirnar á bilunum vóru eisini blendaðar, soleiðis, at tær bara lýstu beint niður og ikki frameftir.

Hannefía greiðir frá, at tey í Fugloy keyptu petrolium upp í fløskur til lampurnar.

– Undir krígnum spardi man alt, man kundi, men eg minnist, at jólaaftan varð petroliumslampan ikki sløkt um kvøldið, sum vant. Ístaðin slapp hon at brenna út, og tað var nakað heilt serligt, greiðir hon frá.

### Rationeringar

– Tað var trot á matvørum, og tí vóru